

*Jákup Oluf Joensen hevur havt eina góða konu við Rosmundu. Heimið á Mørkini er hugnaligt, og rundan um húsini er snøgt tún og vakur og hugnaligur urtagarður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

síðan, fylgir hann væl við øllum, sum gongur fyri seg við bryggjukantin.

Kona hansara, Rosmunda, sigur, meðan vit práta, at tað kemur ikki eitt skip inn um Ennið, at Jákup Oluf ikki fer eftir kikaranum og vil hava at vita, hvat skip talan er um.

*- Tað kemur ikki skip inn um Ennið, at Jákup Oluf ikki fer eftir kikaranum, sigur kona hansara, Rosmunda*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



- Eg koyri framvegis nógvar túrar norður á bryggjuna og hyggi, hvat gongur fyri seg, og av og á detti eg inn á gólvið til ein kaffimunn.

Jákup Oluf sigur, at hann kennir ikki øll tey ungu, sum eru á virkinum í dag, men hann ivast onga løtu í, at tað eru dugnalig fólk, sum tey tilkomnu og eldru á virkinum hava fingið aftrat sær, sum tíðin er liðin.

- Øll hava trivist væl á Havsbrún, og tað er orsøkin til, at fólk eru vorðin so "gomul" í starvi á virkinum. Haraftrat hevur leiðslan havt tann hugburð, at eingin verður sagdur úr starvi fyri aldur. Hetta haldi eg er ógvuliga gott fyri tey, sum hava tænt fyritøkuni leingi og eru komin nakað upp í árini.

## Í góðum hondum

Hann sigur, at hann hevur fult álit á, at tann leiðsla, sum virkið hevur í dag og tey starvsfólk, sum leiðslan hevur aftrat sær, fara at megna at ganga framtíðini á møti.

- Tey, sum standa við ábyrgdini á virkinum, eru ung og dugnalig fólk við góðum útbúgvingum og drúgvum royndum á sínum øki. Jú, eg haldi, at framtíðin hjá Havsbrún er í góðum hondum, sigur Jákup Oluf Joensen.

Í blaðnum í morgin fara vit at práta við Jákup Oluf Joensen um tíðina, hann var til skips, og onkur søga verður um tíðina, hann fekst við annað arbeiði.

Kanska verður okkurt meira um tíðina hjá honum á Havsbrún í Fuglafirði.

Meðan vit hava prátað í hugnaliga heiminum hjá Jákup Olufi og Rosmundu á Mørkini í Fuglafirði, hevur hon fors‡nað okkum so væl, bæði við kaffi og góðum køkum.

*Inni í hugnaligu stovuni hongur ein málningur av gamla prestagarðinum í Fuglafirði, og høgrumegin prestagarðin á myndini síggja vit barnaheimið hjá Jákup Olufi, sum tey lótu umbyggja*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

